From: Jan Sjóstein <JanS@fmr.fo>
Sent: hósdagur, 27. november 2025 21:18
To: Løgting <logting@logting.fo>
Cc: Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Subject: LM-043/2025 - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m. (Avskrivingarlógin) (Broyting í avskriving av leiguíbúðum)

Til Fíggjarnevndina

Á fundi í Fíggjarnevndini 24. november 2025 vórðu hesir spurningar settir Fíggjarmálaráðnum í sambandi við *LM-043/2025 - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m. (Avskrivingarlógin) (Broyting í avskriving av leiguíbúðum)*

1. **Hvørjar reglur eru galdandi fyri bygningar til útleiging, tá tað eru færri enn 10 íbúðir**

Meginreglan fyri skattliga avskriving av bygningum er, at bygningurin verður nýttur vinnuliga sambært § 17, stk. 1 í avskrivingarlógini. Avskriving kann tí ikki verða gjørd fyri bygningar, sum verða nýttir til bústað ella endamál í samband við hetta t.d. íbúðir, sethús, hús til frítíðarendamál ella ítriv, uttan mun til, um hesi verða leigað út. Ásetingin í § 17, stk. 1, litra b um skattliga avskriving av bygningum til útleiging er sostatt eitt undantak, sum heimilar skattliga avskriving av bygningum, sum verða nýttir til bústað, treytað av, at bygningurin hevur minst 10 íbúðir til útleiging.

2. **Skilmarking millum íbúðir og gistingarhús eftir reglunum í avskrivingarlógini**

TAKS veit ikki um nakað mál, har ivamál hevur verið um, hvørt talan er um gistingarhús ella íbúðir.

3. **Biðið verður um tøl um skatting av afturvunnum avskrivingum í sambandi við sølu av íbúðarbygningum sbrt. § 17, stk. 1, litra b í avskrivingarlógini**

TAKS hevur ikki hagtøl, sum vísa um ella hvussu nógvar sølur, ið hava viðført skatting av afturvunnum avskrivingum við sølu av íbúðarbygningi sambært § 17, stk. 1, litra b í avskrivingarlógini.

Vinarliga – With regards

Jan Sjóstein
Deildarstjóri
Office: +298 352010
Mobile: +298 552010

jans@fmr.fo

FØROYA LANDSSTÝRI
The Government of the Faroe Islands

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance
Tinganes / FO-100 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 352020 /
fmr@fmr.fo / www.fmr.fo